## Góð tíðindi til kvinnurnar

Fundurin, sum ein bólkur av kvinnum skuldi hava við løgmann um at broyta vallógina so at tað verður lættari hjá kvinnum at koma inn á ting, er útsettur eina viku, tí løgmaður vil hava landsstýrismannin í innlendismálum við á fundin.Fyrireikararnir halda, at hetta eru góð tíðindi, tí tey taka hetta sum eitt tekin um, at ætlanin er at gera nakað við trupuuleikan. Upprunaliga var talan um ein bólk av javnaðarkvinnum, sum skuldi á fund við løgmann um evni, men nú er greitt, at kvinnur úr øðrum flokkum verða eisini við. Endamálið er at broyta vallógina, so at tað verður lættari hjá sama flokki at hava fleiri listar í einum valdømi við tí endamáli at gera kvinnulistar burturav



## Seinasta uppstillingin

Í annaðkvøld kl. 19 fara limirnir í Norðoya Fólkafloksfelag á fund í róðrarneystinum í Árnafirði at gera av, hvussu listin hjá felagnum til løgtingsvalið næsta ár skal síggja út. Hetta er tann triði og seinasti uppstillingarfundurin hjá felagnum. Aftan á tann fyrsta fundin vóru løgtingsmenninir Annfinn Kallsberg og Jógvan við Keldu á listanum saman við varaborgarstjóranum í Klaksvík, Jákupi Mikkelsen, og á øðrum fundi komu trý valevni afturat.

*Absalon í Buð er formaður í Norðoya Fólkafloksfelag (Mynd: Norðlýsið)*

# Vit kundu verið við í flogfarinum

**- Ferðamannaskrivstovan, sum seldi okkum bussferðaseðlarnar, hevði beint tá sent vinmenn okkara við vanlukkuflogfarinum. Men av tí, at vit vildu spara pengar, ynsktu vit heldur at koyra 10 tímar við bussi, sigur Durita Waag Høgnesen, sum saman við trimum vinkonum er stødd í Phuket. Til alla lukku, komu teir báðir svensku vinmenninir frá vanlukkuni við lívinum**

FLOGVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*




*Tann 24. august fóru tær fýra, Elin Hansen (22) úr Kvívík, Anna Berg (20) úr Havn, Gunnva Brockie (21) úr Havn, og Durita Waag Høgnesen úr Vestamanna á fjakkaraferð kring heimin. Ætlanin er, at tær verða heima aftur tann 20. desember. Tær fara at vitja India, Kina, Tailand, Ný Sæland, Avstralia, Tahiti, Cook oyggjarnar og Los Angeles*

Vinmenninir hjá fýra føroyskum fjakkarum í Tailandi komu til alla lukku úr vanlukkuflogfarinum, sum kravdi eini 90 mannalív sunnumorgunin. Teir fýra føroysku fjakkararnir Elin Hansen, Anna Berg, Gunnva Brockie og Durita Waag Høgnesen høvdu avtalað at hitta svensku vinmenninir í Phuket, og kundu tær fýra eins væl verið við sama flogfari.

- Ferðamannaskrivstovan, sum seldi okkum bussferðaseðlarnar, hevði beint tá sent fleiri fólk við vanlukkuflogfarinum. Men av tí, at vit vildu spara pengar, ynsktu vit heldur at koyra 10 tímar við bussi, sigur Durita Vaag Høgnessen.



*– Tað kendist sum um, at trupulleikar við lendingini gjørdu, at flogskiparin royndi at fáa flogfarið at fara uppfrá aftur, sigur 25 ára gamla Christoff1er Marken*

Teir báðir svensku vinmenninir sótu beint við neyðdyrnar, og sluppu úr flogfarinum í evstu stund. Í dag verða teir skírdir hetjur í heimlandinum Svøríki, tí teir bjargaðu fleiri ferðafólkum úr brennandi flogfarinum.

- Vit fingu boðini um vanlukkuna í sjónvarpinum á ferðamannaskrivstovuni, men tá vistu vit ikki fyri vist, um tað var teirra flogfar, ella eitt annað av teimum mongu, sum skuldi fara um somu tíð. Tað var sera vánaligt veður, toran gekk og tað regnaði illa. Meðan vit koyrdu í bussinum til Phuket, ringdi systir Gunnvá, at kanna um alt var í lagi, tí tey høvdu longu frætt um vanlukkuna heima í Føroyum. So meðan vit koyrdu við bussinum, sótu familjurnar í Føroyum og kannaðu á internetinum fyri okkum, um vinmenninir vóru við í flogfarinum.

### Nógvir útlendingar

Tað var sunnumorgunin um 10 tíðina føroyska tíð at ein syndarlig flogvanlukka hendi á flogvøllinum í Phuket í Tailandi. Í flogfarinum vóru 123 ferðafólk, harav í minsta lagi 91 lótu lív. 55 av teimum deyðu vóru útlendingar, og 36 tailendingar. Tilsamans vóru umleið 70 útlendingar umborð. Sambært vitnum, var veðrið sera vánaligt har um leiðir í gjár, við nógvum vindi og ógvusligum ælingi. Roknað verður við, at kraftigur síðuvindur var orsøk til vanlukkuna.

Sambært svenskum miðlum, eru tveir svenskir tannáringar millum tey deyðu. Ein teirra er longu funnin, meðan hin framvegis er saknaður. Millum tey deyðu eru eisini borgarar úr Ísrael, Írlandi, Australia og Bretlandi.

### Fingu boð úr Føroyum

- Vit vóru ræðuliga bangnar, tí vit vistu onki. Og meðan vit koyrdu í bussinum til Phuket, fingu vit boðini um, at tað var flogfar teirra, og at øll helst vóru deyð. Vit royndu at ringja og sms'a til teir, men fingu onki svar, og tá fingu vit sjálvandi illgruna um, at tað var enda galið, og vóru púra knústar. Men seinni fingu vit boð úr Føroyum um, at tveir sviar um 25 ár vóru á lívi. Tá vóru vit øgiliga gleðar, tí vit roknaðu ikki við at tað vóru so nógvir sviar í tí aldurbólkinum í flogfarinum.

### Vinmenn vóru við

- Vit lærdu sviarnar at kenna fyri trimum døgum síðani í einum lítlum býi uttan fyri Bangkok, har vit búðu saman í einum húsbáti. Allan tann fyrsta dagin hugnaðu vit okkum saman, vaskaðu fílum og fóru síðani at ríða við fílum úti í skóginum saman. Síðani fóru vit við hvør sínum bussi til Bangkok, har vit avtalaðu at møtast. So har fingu vit eisini ein dag saman, vóru úti og ótu góðan mat og fóru í býin saman um kvøldið, til einaferð um trítíðina um náttina. Dagin eftir skuldu vit øll til Phuket, har vit skuldu møtast aftur. Vit keyptu ferðaseðil á somu skrivstovu, men fyri at spara pengar, vildu vit heldur koyra við bussi, meðan teir vildu við flogfarið, sigur Durita.

Og hon greiðir víðari frá, at í Phuket fingu tær at vita, at tey deyðu vórðu send á eitt sjúkrahús, meðan tey livandi vóru á einum øðrum.

- Vit fóru so at leita, og við góðari hjálp frá starvsfólkunum á sjúkrahúsinum, funnu vit útav, at svensku vinirnir vóru farnir haðani til gongu. Og hóast tey ikki vistu, hvagar teir vóru farnir, settu tey eina kanning í verk, so vit fingu navnið á hotellinum, sum teir fóru á.

- So nú hava vit lagt eini boð á hotellið, har teir hava skrivað seg inn, tí teir eru farnir á flogvøllin at fáa nýtt pass og líknandi, sigur ein lætta Durita, sum nú bíðar eftir at sviarnir seta seg í samband við tær.

### Krasjaði við lending

Svenska blaðið Aftonbladet hevur prátað við 25 ára gamla Christoff1er Marken, ið var millum tey fáu, sum komu undan flogvanlukkuni við lívinum. Eisini vinur hansara Erik Nihlén slapp úr flogfarinum í evstu stund.

– Tað kendist sum um, at trupulleikar við lendingini gjørdu, at flogskiparin royndi at fáa flogfarið at fara uppfrá aftur. Í staðin krasjaði tað uttanfyri lendingarbreytini, sigur Christoffer Marken, sum varð innlagdur á eitt lasarett í býnum. Beint sum flogfarið rendi á, fór tað sundur í tvey og eldur kom í. Bert eini 20 ferðafólk komu út, nógv teirra illa meiðsla og brend.

Av tí at Christoffer og vinmaðurin sótu næst neyðútgongdini, eydnaðist tað teimum at fáa hurðina upp og at leypa út á vongin. Meðan Christoffer fekk hurðina upp, hjálpti Erik ræðusluslignu fólkunum út og burtur frá hurðini.

– Har var nógvur vindur og ógvuligur ælingur. Kortini fingu vit fleiri skríggjandi og skelkaði fólk yvir í tveir sjúkrabilar, sigur Christoffer, sum misti brillurnar, og tí ikki sá so væl. Teir báðir ungu sviarnir komu frá vanlukkuni við smærri snuddum.

– Men vit eru sjálvandi sera skelkaðir báðir tveir, sigur Christoffer.